## 260 hk Mazda6



Komandi ár kemur ein sportslig útgava av Mazda6 við 2,3 litur motori og umleið 260 hk. Bilurin skal kappast við bilar sum t.d. Alfa Romeo 156 GTA

*Kelda: Bil Magasinet*

## Rolls Royce handil í Moskva



Tað hevði verið heilt óhugsandi fyri nøkrum árum síðan at Rolls Royce, sum er ímyndin av kapitalismuni, skuldu verða seldir nærhendis Kreml í Moskva. Í handlinum er eisini ein gamal Rolls Royce, sum Lenin einaferð átti

*Kelda: Bil Magasinet*

## Meiri orku til Sorento



Kia Sorento við 4 syl. 2,5 litur motori fáa nú meira orku, við tað at snúningsmomenti verður broytt frá 314 til 343. Hestakreftirnar vera tó framvegis 140

*Kelda: Bil Magasinet*



*VW Passat 2005. Elegant og smart design sum eisini líkist núverandi Passat*

# Nýggjur VW Passat í 2005

**Komandi ár verður núverandi VW Passat, sum fyrstu ferð kom á marknaðin í 1996, skiftur út við ein heilt nýggjan Passat, sum líkist tí størra VW Phaeton**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Aftan líkist Passat serliga nógv VW Phaeton*

Nýggi VW Passat kemur á marknaðin um eitt ár. Talan verður um ein bil, sum verður bygdur yvir ein nakað størri VW Golf plattform.

Á núverandi Passat er motorurin upp á longs, meðan á tí nýggja stendur motorurin upp á tvørs. Bæði tað at motorurin stendur upp á tvørs, og tað at aksilfrástøðan verður størri, ger at bilurin verður væl rúmligari, uttan tó at blíva størri uttan.

Undirvognurin verður eins og á Golfinum við McPherson fjaðraskipan framman og multilinkbakakslum. Servostýringin verður elektrohydraulisk.

Nýggi Passat líkist nógv tí størra VW Phaeton bæði uttan og innan. Hann minnir ikki sørt um Audi við kølaragittaranum, sum fer niður ímillum kúfangaran. Designið er smart og kvaliteturin verður á høgum støði.

Bensinmotorarnir verða av teimum nýggju FSI við beinleiðis bensin-innspræning, og dieselmotorarnir verða teir kendu TDI.

Nýggi Passat kemur fyrst sum sedan og hálvt ár seinni sum stationcar.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg apr. 98, Km 28.000. Sera vælhildin. Top modell: Bert koyrt 28.000 km. Klimaanlegg, leðurinntrekk, sóltak, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás, radio, alufelgur, spoylarar v.m.
**Sertilboð kr. 198.000,00**



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg apr. 99, Km 71.000.
**Kr. 86.000.**



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg okt. 97, Km 159.000. El-rútar, framman, valnød instrumentbretti, takboylar, sleipikrók v.m.
**Kr. 66.000.**



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Aircondition, alufelgur, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, el-spegl v.hita, CD-anlegg, sleipikrók v.m.
**Kr. 158.000.**



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor, 4 WD v.reduktiónsgear, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, el-spegl, CD-anlegg v.m.
**Kr. 128.000.**



**DAEWOO LANOS 1.6 SEDAN**
Árg Maj. 1998, Km 43.900.
**Kr. 68.000.**



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sentrallás, el-rútar, el-spegl, radio v.bandspælara v.m. Kr. 78.000.
**Eyka tectylviðgjørdur.**

P/f D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600**
**Fax 310650**



**MAZDA PREMACY 2,0 TD**
Árg feb. 01, Km 114.000. Turbo diesel, air-con., fløguspælara, el-rútar, el-spegl, fjarstýrt sentrallás v.m.
**Kr 138.000.**



**OPEL VECTRA, TURBO-DIESEL**
Árg juli 98, Km 119.000. El-rútar, el-spegl, hita í setrunum, CD, fjarstýrt sentrallás.
**Kr. 116.000.**



**VOLVO 440, 1,8**
Árg 94, Km 183.000. Air-condition, sentrallás.
**Kr. 59.000.**



**FORD MONDEO, DIESEL**
Árg feb. 95, Km 151.000. Sleipikrók.
**Kr. 69.000.**

**VOLVO 460 1,8**
Árg sep. 95, Km 81.000.
**Kr. 75.000.**



**VOLVO 440, 1,8**
Árg jan. 96, Km 76.000. El-rútar, el-spegl, hita í setrunum, VOLVO sportfelgur, fjarstýrt sentrallás, spoilara aftan.
**Kr. 89.000.**



**MAZDA E2200 DIESEL**
Árg mai 97, Km 121.000. Høgur. Kr. 79000 v/MVG.
**Sertilboð!!!**

**RENAULT KANGOO**
Árg jul. 02, Km 24.700.
**Kr. 135.000.**

**VOLVO 440, 1,8**
Árg juni 95, Km 166.000. El-rútar, sentrallás, eyka sett av dekkum.
**Kr. 58.000.**



**GOLF TURBO DIESEL**
Árg okt. 95, Km 214.000. El-sóltak, Remus-tuningsútstoyt, hæddarstillað førarasetur, v.m.
**Kr. 84.000. – Nýsýnaður!**



**NISSAN ECO T-100**
Árg des.96, Km bert 35000. Sum nýggjur! Nú Kr. 79.000 + MVG.
**Ger kvetti!**



**VOLVO S40 1.8**
Árg okt. 01, Km 55.000. Sær út sum nýggjur – Nógva útgerð.
**Kr. 184.000.**

VOLVO RENAULT
VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110



**PEUGEOT 306 GTI**
Árg. juli. 99, Km 72.000. **Telefon: 251800.**



**HONDA ACCORD 1,8I**
Árg. aug. 98, Km 67.000. Bilurin er sera væl hildin, hevur el-rútar, sleipikrók, píkadekk, og heilársdekk á felgum fylgja við.
**Telefon: 313799 - 221158.**
**Kr. 89.500.**

# Leirvíkingar fáa stórt uppland á Kráartanga

**– Arbeiðið gongur sína gongd, sigur Sjúrður Eliasen, bygdarráðsformaður í Leirvík**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bygdarráðsformaðurin í Leirvík, Sjúrður Eliasen, sigur, at enn er grótbáturin ikki farin at sigla úr Klaksvík við verjugróti til upplandið, sum nú verður lagt út á Kráartanga.

– Men væntandi byrjar siglingin rættiliga skjótt, sigur hann.

Leirvíkar kommuna hevur latið byggja ein veg gjøgnum fjøruna og norður á Kráartanga, har bygdarráðið hevur samtykt at gera eitt stórt uppland.

– Vit miðja eftir at fáa eitt uppland, sum verður einar 14.000 fermetrar stórt.

Grótið, sum kemur úr undirsjóvartunlinum, verður nýtt til útfylling, og síðan verður stórt grót lagt sum verja, soleiðis at útfyllingin ikki skolar burtur í uppgangi.

– Tað er hetta grótið, sum flutt verður við grótbáti úr Klaksvík.

Bygdarráðsformaðurin vísir á, at grót úr tunlinum eisini verður flutt um Leirvíksfjørð til Klaksvíkar, og síðan verður báturin aftur fyltur í Klaksvík við stórum gróti, ið verður lagt sum verja á Kráartanga.

– Soleiðis kemur báturin at sigla lastaður báðar vegir, tá ið siglingin byrjar, sigur Sjúrður.

Hann veit ikki heilt ítøkiliga, hvussu langa tíð, tað kemur at taka at fylla upp á Kráartanga og vil í løtuni ikki geva nakað boð uppá, hvat tað kemur at kosta.

– Men arbeiði gongur sína gongd, sigur Sjúrður Eliasen.



*– Arbeiðið at fylla upp á Kráartanga gongur sína gongd, sigur Sjúrður Eliasen, bygdarráðsformaður í Leirvík*

*Mynd: Edvard Joensen*